

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 02 - 2013

# Óvanligur gestur í Odense

Tað var einki minni enn ein stórhending í gjár, tá sleipibátar togaðu hotellpallin Borgholm Dolphin inn ígjøgnum Odense-fjørðin til Lindø, har hann skal umvælast. So stórt far hava fólk ikki sæð á fjørðinum, síðani Mærsk gavst at byggja skip í Lindø, og fólk stóðu fram við bakkanum báðumegin fjørðin og eygleiddu tann 70 metrar breiða pallin. Borgholm Dolphin skal til eftirlit og umvælingar á Fayard, sum er fyrrverandi Fredericia Skibsværft, og sum heldur til í Lindø Industripark. Hetta er mett at taka ein mánað, og har verður arbeiði til 250 fólk. Higartil eru stórir oljupallar umvældir í Frederikshavn ella í Esbjerg, og hetta er fyrstu ferð, at ein pallur er togaður inn til Lindø. Tað ber til nú, tí siglingarrennan inn hagar er nýliga víðkað við tí fyri eyga at gera tað møguligt at fáa oljupallar hagar tyil umvælingar, sigur DR.